# Føroyingur í lívsvanda eftir kníválop í Keypmannahavn

**Ein føroyingur var leygarkvøldið í lívsvanda, eftir at ein dani hevði stungið hann ógvusliga í búkin uttan fyri vertshúsið "Nuuk" á Vesturbrúgv í Keypmannahavn. Bróður hansara fekk eisini løstir**

HARÐSKAPUR
*Rúnar Reistrup*



*Danska sjónvarpsstøðin Localeye tók hesa mynd av niðurstungna føroyinginum*

Tveir føroyskir brøður, annar mitt í fjørutunum hin mitt í tretivunum, vórðu leygarkvøldið álopnir av einum manni við knívi uttanfyri vertshúsið Nuuk á Gasværksvej í Keypmannahavn. Annar føroyingurin varð stungin so ógvusliga í búkin at hann var í lívsvanda. Yngri bróður hansara fekk løstir í hendur, bein og akslar í royndunum at basa álopsmanninum, upplysir varaovastin á kriminalløgregludeildini í Keypmannahavn, Jonny Lundberg fyri Sosialinum.

Sum skilst eru umstøðurnar um tilburðin enn eitt sindur ógreiðar. Hvørgin av teimum álopnu veit við vissu, hvør tað var, sum dró knív ímóti teimum. Men tað tykist greitt, at tað vóru føroyingarnir, sum vórðu álopnir.

- Tað, sum hendi var eftir øllum at døma, at teir báðir føroyingarnir, eftir at teir høvdu fingið eitt sindur at drekka fyrr um kvøldið, fóru inn á vertshúsið »Nuuk«. Har komu teir í prát við ein norðmann og ein dana, greiðir Jonny Lundberg frá.

Prátið millum føroyingarnar og hinar báðar gjørdist til kegl, sum eftir øllum at døma snúði seg um grønlendsku unnustuna hjá dananum. Men ongin harðskapur stóðst av hesum inni á »Nuuk«.

- Men tá føroyingarnir báðir valdu at fara úr vertshúsinum umleið kl. 21.00 hetta leygarkvøldið verða teir álopnir av einum manni við knívi. Akkurát hvat hendi er eitt sindur ógreitt, tí tað tykist sum at støðan var rættiliga kaotiskt. Men vit eru rættiliga vís í at álopið hevði beinleiðis samband við keglið fyrr um kvøldið, sigur Jonny Lundberg.

## Small á veg eftir hjálp

Eftir tilburðin royndu teir báðir føroysku brøðurnir at koma sær yvir á politistøðina á Halmtorvet einar 200 metrar frá gerningsstaðnum. Tað eydnaðist tí minni løstaða at koma á støðina og boða frá tilburðinum, men tann verri løstaði small mitt á gøtuni,

Læknar komu beinanvegin á staðið, har tann illa løstaði føroyingurin lá, og teir kundu staðfesta, at hann var í lívsvanda. Hann varð fluttur á Ríkissjúkrahúsið kom seinni betur fyri seg og verður nú mettur at vera uttan fyri lívsvanda. Hin bróðurin bleiv kannaður og útskrivaður aftur beinanvegin.

Løgreglan fór beinanvegin á gerningsstaðið og handtók seinni ein 47 ára gamlan dana, sum var undir illgruna fyri at hava framt álopið á føroysku menninar. Men til grundlógarhoyr metti dómarin ikki at haldgóð prógv vóru ímóti manninum og hann valdi tí ikki at varðhaldsfongsla tann 47 ára gamla, sum tískil varð latin leysur aftur næsta morgun. Hetta var ikki sami maður sum føroyingarnir fyrr um kvøldið høvdu keglast við.

Varaovastin á kriminaldeildini sigur fyri Sosialinum, at leyslatni maðurin framvegis er undir illgruna fyri at hava framt álopið. Løgreglan kannar nú umstøðurnar kring tilburðin til botns.

Maðurin, sum var í lívsvanda eftir tilburðin, er búsitandi í Føroyum. Hann var í Keypmannahavn og vitjaði bróðurin, ið er búsitandi í Danmark.

# Tríggjar vindmyllur komnar til landið

**Sp/f Røkt hevur nú fingið tær tríggjar vindmyllurnar til landið, sum skulu framleiða orku**

ORKUFRAMLEIÐSLA
*Heini í Skorini*

Á fundi fyri nøkrum vikum síðani samdist umboðsmannaráðið í SEV at geva Sp/f Røkt grønt ljós at framleiða orku við trimum vindmyllum, sum sunnudagin komu til landið.

Við at nýta el-kervið hjá SEV kann smápartafelagið nú selja ta orku, sum framleidd verður við nýinnkeyptu vindmyllunum, og skulu myllurnar standa á Mýrini í haganum omanfyri Vestmanna.

Danska vindmyllufyritøkan Vestas hevur selt Sp/f Røkt vindmyllurnar, sum kunnu framleiða 660 kw í part, og er hetta nóg mikið av orku til 12-1400 húski í Føroyum. Í fyrstu atløgu eru ætlanirnar hjá smápartafelagnum at selja orkuna beinleiðis til SEV.

Stjórin í Sp/f Røkt, Johan í Niðristovu, sigur, at verkætlanin kostar umleið 15 mió, og klárt verður at framleiða um umleið ein mánað

## SEV einkarrættur farin í søguna

Við nýggju íløgunum hjá Sp/f Røkt er nú greitt, at einkarrætturin til orkuframleiðslu í Føroyum ikki longur er í SEV. Sostatt kann eitt og hvørt privat partafelag í framtíðini framleiða orku gjøgnum elkervið hjá SEV. Hetta er einki minni enn ein søgulig hending, og kann talan tískil gerast um privata kapping á hesum øki um nøkur ár.

## SEV eisini royna vindmyllur

Verkætlanin við vindmyllum er eisini ein partur av framtíðarætlanunum hjá SEV, sum eins og Sp/f Røkt hevur í hyggju at fáa tríggjar vindmyllur til landið frá somu fyritøku Vestas. Tó er talan ikki um nakað ítøkiligt úrslit enn í SEV, men væntandi verður hetta ein veruleiki í framtíðini.



*Sunnudagin komu tríggjar vindmyllur til landið, sum skulu framleiða orku, og smápartafelagið Røkt stendur fyri verkætlanini*

Mynd: Finnur Justinussen



# -Spurningur um at geva og taka

**Skulu arbeiðarafeløgini geva verkfalsrættin frá sær, er avgerandi, at tey fáa nakað munagott afturfyri frá arbeiðsgevarunum, sigur Jákup Pauli Strøm. Hann metir eisini høvuðsorsøkina til, at føroyingar eru afturúrsigldir á arbeiðsmarknaðarøki numvera, at vit hava alt ov spjaddan arbeiðsmarkna. Ein loysn kundi verðið, at sett eitt føroyskt LO á stovn**

ÓSEMJUR Á ARBEIÐSMARKNAÐINUM
*Páll Holm Johannesen*

Jákup Pauli Strøm, studentaskúlalærari, skrivaði fyri nøkrum árum síðan bók um føroyska arbeiðsmarknaðinum. Heitið á bókini er »Tit bygdu hetta land«, og viðger bókin breitt viðurskiftini á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Jákup Pauli metir, at tað eru fleiri orsøkir til, at tað hevur verið so torført hjá feløgunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum at semjast um ein fastan gerðarrætt. Hann heldur, at alt botnar í spurninginum, hvussu nógv partarnir vilja geva og taka.

– Eg haldi, at arbeiðsgevararnir í Føroyum kundu gjørt eitt sindur meira fyri einum føstum gerðarrætti, tí høvdu fakfeløgini fingið nakað munagott afturfyri at geva verkfalsrættin frá sær, so høvdu vit møguliga havt eina avtalu millum arbeiðstakararnar og arbeiðsgevararnar í dag, sigur Jákup Pauli Strøm.

Hann vísir á, at tað í roynd og veru snýr sum vald. Verkfalsrætturin er avgerandi fyri arbeiðstakararnar, og geva tey hann frá sær, so missa tey nógv vald mótvegis arbeiðs-gevarunum, heldur Jákup Pauli.

Hann metir tí, at vil man koma burturfrá gomlu naggatódnini millum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar, so er neyðugt, at arbeiðsgevararnir lúka nøkur krøv hjá arbeiðstakarunum, um teir skulu fáast geva verkfalsrættin frá sær. Jákup Pauli dugir ikki siga, hvørji krøv talan kundi verðið um, men leggur afturat, tað átti at verið møguligt at gjørt avtalu um onnur viðurskifti enn lønarviðurskiftini, tí tað er vanligt í øðrum londum.

Søgufrøðingurin heldur eisini, at tað er ov vánaligt av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, at teir ikki hava megnað at funnið fram til eina semju á økinum øll hesi árini.

– Vit yvirtóku arbeiðsmarknaðarmál við Heimastýrislógini í 1948, og framvegis sita flestu feløgini við ongari høvuðsavtalu, ei heldur er ein yvirskipaður stovnur sum LO fingin á stovn, og tað er ov vánaligt, um vit skulu samanbera okkum við onnur lond, sigur Jákup Pauli Strøm.

## Ov spjødd

Spurdur, um hví vit eru eftirbátar á arbeiðsmarknaðarøkinum, svarar Jákup Pauli, at tað eru fleiri orsøkir til tess.

– Vit hava ein ómetaliga spjaddan og rótutan arbeiðsmarkna við nógvum smáum feløgum, sum flest øll vilja arbeiða sjálvstøðugt. Afturat er arbeiðsmarknaðurin sundurbýttur í alment-privat, á sjógvilandi, og øll hesi áhugamál eru torfør at samansjóða, og tað er ein av grundunum, vit eru afturúr, greiðir Jákup Pauli Strøm frá.

Jákup Pauli Strøm leggur afturat, at ein uppløgd loysn er at stovnseta eitt føroyskt LO, sum kundi savna feløgini, og tryggja frið á arbeiðsmarknaðinum. Men eisini á tí økinum, hava partarnar torført við semjast, sigur hann at enda.

Stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen:

# -Lóggeving er einfaldasta loysnin

**Tað er ov lætt hjá Ingeborg Vinther og Gunnleivi Dalsgaard at føra fram, at vit ikki eru so hart rakt av verkføllum í Føroyum, tí fakta vísir júst tað mótsatta, sigur Jan Mortensen. Stjórin í Vinnuhúsinum metir, at fasti gerðarrætturin er eitt positivt stig fyri føroyska samfelagið**

ÓSEMJUR Á ARBEIÐSMARKNAÐINUM
*Páll Holm Johannesen*



*Lóggeving fyri einum føstum gerðarrætti er einfaldasta loysnin, tí nú er nóg nógv práta aftur og fram, heldur stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen*

Mynd: Savnsmynd

Í leygardagsblaðnum vísti forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, á, at uppskotið hjá Vinnumálaráðnum, sum millum annað fevnir ein um fastan gerðarrætt er diktatoriskt. Hon er av teirri áskoðan, at verður uppskotið um at lóggeva fyri einum føstum gerðarrætti samtykt, verða demokratisk rættindi tikin frá arbeiðarunum, og verkfalsrætturin nógv skerdur.

Umboðið fyri arbeiðsgevararnar á privata arbeiðsmarknaðinum, Jan Mortensen, heldur, at bæði Ingeborg Vinther og formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgaard, eru sloppin ov lætt við at føra fram ósannindi í fjølmiðlunum.

– Hvat meinar Ingeborg við, tá hon vísir á, at vit ikki hava havt so nógv verkføll í Føroyum, tí fakta vísir greitt, at vit, samanborið við onnur lond, hava verið hart rakt av verkføllum. Tað passar tí ikki, sum hon førir fram, sigur Jan Mortensen.

## Lóggevving besta loysnin

Í flestu londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, hava tað verið feløgini á arbeiðsmarknaðinum sjálvi, sum eru komin ásamt um at skipa fyri einum føstum gerðarrætti, so træturnar á arbeiðsmarknaðinum verða skjótt og greitt avgreiddar.

Spurdur, um tað ikki heldur verið ynskiligt, at feløgini á føroyska arbeiðsmarknaðinum sjálvi samdust um at seta ein fastan gerðarrætt á stovn, heldur enn, at tað verður lóggivið fyri einum slíkum stovni, svarar stjórin í Vinnuhúsinum, at tað hevur verið nógv tosað aftur og fram um fastan gerðarrætt, men einki kemur burturúr.

– Tað er einki alternativ til eina lóggeving, tí tíðin hevur víst, at einki kemur burturúr prátinum, og tí er lóggeving einfaldasta loysnin, greiðir Jan Mortensen frá.

Jan Mortensen er ikki í iva um, at ein fastur gerðarrættur er eitt positivt stig fyri føroyska samfelagið.

– Eg eri fullgreiður yvir, at fleiri av ósemjunum seinastu árini hava verið eftir, at sáttmálaskeiðið er lokið, men vit mugu ikki gloyma, at vit eisini hava havt fleiri sáttmálatrætur, eitt nú við skipamálunum, og í teimum førunum hevði tað verið ynskiligt, at havt ein fastan gerðarrætt at loysa ósemjurnar skjótt, heldur Jan Mortensen.

## Hava gjørt spurnarkanning

Eftir drúgva verkfalli á privata arbeiðsmarknaðinum í vár, fór Vinnuhúsið undir at arbeiða við, hvat kundi gerast fyri, at vit ikki endaðu í somu støðu aftur. Ein av uppgávunum var at gera eina spurnarkanning um, hvat føroyingar halda um skipanina á føroyska arbeiðsmarknaðinum, og um tey meta tørv verða fyri broytingum.

Spurnarkanningin er gjørd, og væntandi verður úrslitið almannakunngjørt seinni í viku.

– Hóast kanningin ikki enn er almannakunngjørd, so hava vit greiðar ábendingar um, at føroyingar ynskja broytingar á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Umframt at ynskja broytingar, so bendir nógv á, at tað er tvørturum floksmørk, at fólk ynskja broytingar, so tað sær spennandi út, sigur Jan Mortensen at enda.